

*Óla Jákup Jacobsen syrgir fyri, at pallurin verður klárur til bólkarnar, sum skulu spæla á G! festivalinum á Gøtustevnu fríggjakvøldið*

*Mynd: Finnur Justinussen*

G! festivalurin:

# Pallurin er av sandi

STEVNUPRÁT
*Ingrid Bjarnastein*

**Syðrugøta:** Gøtumenn eru so smátt komnir í stevnuhýr nú árliga Gøtustevnan aftur er á skránni. Men bygdin sær ikki nógv broytt út, sjálvt um ein stevna stendur fyri durum. Á sandinum stendur ein gravmaskina, og grevur nakað, ið kann líkjast einum palli. Vit fingu eitt orð á føraran, Óla Jákup Jacobsen, sum er ektaður gøtumaður.

– Eg gravi pallin til konsertina, sum skal vera her fríggjakvøldið. Sum eg havi skilt, so skal sjálvur pallurin vera av sandi, og síðani verða plátur lagdar omaná, sigur Óla Jákup Jacobsen.

– Tað tekur bara eina løtu at gera ein slíkan pall. Eg havi gravað í eini tveir tímar, og pallurin skal vera 6 x 8 metrar.

Umframt at gera pallin kláran til Clickhaze, MC-Hár, Enekk, Hanus G. Johansen, Søren Søgaard og Valeri & Desislava Dimchevi, so hevur Óla Jákup hampað rundan um sjálvan sandin og við ánna.

Spurdur um flóðin ikki kann fara avstað við tí nú næstan lidna pallinum sigur Óla Jákup:

– Nei, eg havi ikki grivið heilt har niðri við sjóvarmálan, so tá tað er flóð, so stendur vatnið ikki so langt niðan. Men verri verður um tað verður brim, tí so oyðilegst pallurin, men tað vænti eg ikki hesa tíðina av árinum. Mær nýtist heldur ikki at leggja sandin uppá pláss aftur. Tí syrgir Várharra fyri.

Pallurin er við at koma til hølvdar. Okkurt hendinga barnið gongur og rennur á sandinum. Vit takka fyri okkum og fara víðari.

Danir á Slættaratindi:

# 15. ferðin í Føroyum

FERÐING
*Ingrid Bjarnastein*

**Gjógv:** Nú fleiri og fleiri ferðafólk koma til landið, skipað tær ymsu Kunningarstovurnar kring landið fyri gongutúrum og øðrum tiltøkum at bjóða teimum ferðandi.

Mikudagin var eitt lítið ferðalið uppi á Slættaratindi. Talan var um nakrar danir, sum vitja í Føroyum í hesum døgum.

– Tað var ein frálíkur túrur. Tað er fantastisk at síggja alla náttúruna, sigur Ruth Huas, sum var ein av teimum, sum var á Føroya hægsta fjalli.

– Eg haldi annars, at hetta er 15. ferðin eg vitji í Føroyum. Eg havi eisini verið á Slættaratindi fyrr, men tá var tað grátt og yvirskíggjað, og ikki so klárt sum í dag.

Ruth Huas, sum er prestur, sigur, at tað, sum er heilt serligt við Føroyum er náttúran, ljósið og fólkið.

– Og so eisini lundarnir, leggur Maja frá Sælandi flennandi afturat.

– Tað var yvirraskandi at síggja flatan uppi á sjálvum fjallinum. Har var so heitt og stilt, men tá tú komst eitt lítið sindur longur niður varð tað beinanvegin kaldari. Og so eisini útsýnið. Vit sóu heilt yvir til Vágarnar.

Tær báðar eru samdar um, at føroyska náttúran hevur ótrúliga nógvar møguleikar og upplivingar at bjóða fólki. Og eisini rósa tær ferðaleiðaranum, Petur Martin Petersen, sum visti væl at greiða teimum frá.

– Tá Petur Martin segði, at nú fer at verða eitt sindur gráari, varð eitt sindur gráari, og tá hann segði, at nú fór sólin at skína, lættu nøkur skýggj seg, og sólin kagaði fram, greiða tær báðar frá.

Annars hava tær verið undir Vestmannabjørgunum, í Mykinesi og aðrastaðni kring Føroyar. Í gjár lá leiðin til Havnar, har Maja als ikki hevði verið áðrenn. Um nakrar fáar dagar gongur leiðin aftur til Danmarkar, men báðar ynskja at koma aftur til Føroya at ferðast.



*Maja og Ruth eru úr Danmark, og vóru tær báðar ein túr á Føroya hægsta fjalli, Slættaratindi, mikudagin*

*Mynd: Finnur Justinussen*



# Summarfrí í Gøtu



*Hesar fittu smágenturnar eru úr Havn, men vit hittu tær við Gøtusand ein dagin. Her hava tær valt at halda summarfrí í ár*

*Mynd: Finnur Justinussen*

SUMMARPRÁT
*Ingrid Bjarnastein*

**Syðrugøta:** Um vikuskiftið verður Gøtustevna í Gøtu. Tó var ikki so nógv fólk at síggja í bygdini tann dagin Sosialurin trillaði framvið. Men vit hittu tvær smágentur, sum koma úr Havn. Tær halda summarfrí hjá ommuni, sum býr í Syðrugøtu.

– Eg eri og vitji ommu mína, sigur Hanna, sum er 8 ár. – Eg kom fríggjadagin, og eg fari kanska heim sunnudagin. Marjun kom ikki fyrr enn sunnudagin og hon fer kanska avstað í dag, sigur hon og peikar á hina fittu gentuna. Tær báðar sita niðri við sandin og hyggja meðan ein gravimaskina gravar og gert klárt.

Tá Hanna og Marjun eru í Gøtu plaga tær at vera á spæliplássinum og á sandinum. Eisini plaga tær at spæla við onkrar aðrar gentur í bygdini. Tær nevna onkrar við navni, Elspu, Margunn og Heidi.

– Onkuntíð keði eg meg eitt sindur, flennir Hanna. – Tað er alíkavæl eitt sindur betri at vera í Havn.

Hanna sigur, at hon plagar at vera í Gøtu hvørt summar og vitja ommuna, meðan Marjun plagar eisini at vera á Sandi og í Kollafirði.

# Troyggjur til norðurlendingar



*Tøting hevur nógv at gera í hesum døgum. Hallbera Ó. Kristiansen, stjóri á Tøting, sigur at nógv fólk vitja í handlinum nú*

*Mynd: Finnur Justinussen*

HANDILSLÍV
*Ingrid Bjarnastein*

**Syðrugøta:** Summarið stendur í hægsta blóma, sjálvt um sólin ikki hevur kagað so nógv fram, sum vit kanska einaferð høvdu ynskt. Men hetta forðar ikki ferðafólkunum, ið at koma til landið. Ferðafólk eru at síggja nærum allastaðni, og eisini í Tøting er ein rúgva at gera nú summarið er komið til landið.

Inni í sjálvum handlinum er rættiliga rúmligt. Angurin av tøvdari ull er eyðkendur. Men har eru ikki bara troyggjur. Tú fært handskar, jakkar, húgvur, ullvørur, bøkur um Føroyar, lunda-bamsur, dukkur í føroyskum klæðum, føroyskar fløgur, hondmálað krúss, øskubikar og mangt, mangt annað.

– Ja, nú um summarið hava vit eina rúgvu at gera, sigur Hallbera Ólavsdóttir Kristiansen, stjóri á Tøting í Gøtu.

– Her koma nógv fólk um hesa tíðina av árinum.

Hallbera greiðir frá, at tey flestu hava eina troyggju í skjáttuni tá tey fara út aftur.

– Tað eru mest norðurlendingar, sum keypa her, og troyggjurnar eru best umtóktar. Norðmenn, íslendingar, danir og sviar.

Inni í Tøting er eisini ein lítil café. Hetta dámar ferðafólkunum stak væl. Borð og stólar standa á gólvinum, og angurin av kaffi stendur heilt út til hurðina.

– Ferðafólkunum dámar væl at koma her, og so seta seg í caféini eina løtu. Og her vitjar eisini rættiliga fitt av fólki. Tað er ójavnt teir ymsu dagarnar, hvussu nógv fólk vitjar í handlinum. Um veðrið er gott og sólin skínur, so eru ikki so nógv fólk her, men um veðrið er eitt sindur verri, so hava vit fleiri fólk á gátt, greiðir Hallbera frá.

Á teimum undanfarnu gøtustevnunum hevur onkuntíð verið skipað fyri mótasýning, men Hallbera hevur ikki frætt um nakra í ár.

– Men gøtumenn eru í stevnuhýri, sigur Hallbera at enda.